# HM2010 SUÐ

# Europa setti Suðuramerika upp á pláss

**HM2010** Suðuramerikanararnir endaðu á afturpartinum, tá ið europeisku londini settu teir upp á pláss í fjórðingsfinalunum í HM. Stóru stjørnurnar úr Brasil og Argentina fóru grátandi heim

Eyðun Klakstein

Um vikuskiftið fóru tær fýra fjórðingsfinalurnar í HM-endaspælinum avgreiddar á vøllunum í Suðurafrika. Og tað gjørdist til fýra dramatiskar dystir, har tað stóð nógv á spælarunum, úrslitini helst vóru eitt sindur óvæntað, og har Europa setti Suðuramerika upp á pláss.

Fyrr í kappingini helt Diego Maradona, venjari hjá Argentina, fyri, at suðuramerikansku londini vóru sterkari enn tey europeisku, og tey spældu eisini betur fótbólt. Jú, tað var orsøk at geva honum rætt í hesum – í øllum førum tá tað kom til fótbóltsspælið í nógvum av dystunum.

Lond sum Chile, Uruguay og Argentina vístu gott álopsspæl, meðan lond sum Ongland, Italia og Frakland dumpaðu við eitt brak.

Men nú tey sterkastu úr Europa og Suðuramerika brustu saman í avgerandi dystum, var Europa stóri vinnarin. Í trimum fjórðingsfinalum spældu Europa og Suðuramerika ímóti hvørjum øðru, og Europa vann allar dystirnar. Málmunurin var 7-1.

### Teir mætastu máttu lúta

Dysturin millum Brasil og Niðurlond var sermerktur á tann hátt, at Brasil var greitt við yvirlutan í fyrra hálvleiki, meðan Niðurlond tóku sær um reiggj eftir steðgin.

Brasil legði seg á odda, og sum teir spældu fyrstu trý korterini hugsaði eingin tankan um, at heimsins mætasta fótbóltsjóð var á veg úr endaspælinum. Í seinna hálvleiki var sum vent í holuni. Nú vóru teir niðurlendsku spælararnir við yvirlutan, og tað við lít eisini.

Brasil hjálpti Niðurlondum at skora eitt mál, og tá Sneider skoraði til 2-1, og brasiliumenninir kókaðu og fingu eitt reytt kort, kundi tann minna europeiska tjóðin við teimum stóru spælarunum koyra sigurin heim.

Helst mest óvæntaða úrslitið í fjórðingsfinalunum.



*Robinho mátti vónbrotin fara av vøllinum og heim eftir dystin ímóti Niðurlondum*

Mynd: Polfoto



### Afrikanskur grátur

Ghana gjørdi tað sera gott í dystinum ímóti Uruguay, og teir høvdu sigurin innanborða í evstu løtu, men tað endaði álíkavæl við afrikanskum gráti.

Eftir javnleik í vanliga dystinum var neyðugt við umdysti, og í seinasta minutti av umdystinum, fekk Ghana brotsspark, eftir at toppskjúttin hjá Uruguay bjargaði við hondini á málstrikuni. Men tá ið Ghana skuldi senda Jabulani bóltin í meskarnar úr ellivu metrum, kiksaðu teir. Hetta var seinasta sparkið í dystinum, og so varð neyðugt við brotssparkskapping.

Hesa kapping vann Uruguay, og so kundu suðuramerikanararnir fara víðari í kappingini, men sterkasat afrikanska umboðið mátti fara heim.

### Týska maskinan

Týskland hevur vunnið sær nógvar nýggjar fjepparar í hesum HM-endaspælinum – ikki minst eftir fjórðingsfinaluna ímóti Argentina. Týskland vann dystin heili 4-0, og tað var imponerandi at síggja, hvussu teir ungu týsku spælararnir í løtum runnu Argentina um koll. Øzil, Schweinsteiger, Muller og hinir vóru fantastiskir, og stóru argentinsku stjørnurnar máttu at enda viðurkenna, at teir høvdu ongan kjans ímóti týsku maskinuni, sum er blivin meira sjarmerandi og undirhaldandi, enn hon mangan hevur verið.

Týskararnir royna sjálvir at dempa rómin, men nú halda mong – eisini sponsku mótstøðumenninir í hálvfinaluni – at Týskland hevur besta liðið og er favorittur at vinna HM-kappingina hesaferð.